# Stuttligt og læruríkt av savna føroysk frímerki




*„Nýtt úr Føroyum“ kemur út 4 ferðir um árið*




*Vágatunnilin: virði 5 kr. Tvey frímerki eru í røðini*




*Vøluspá: Virði 6,50 kr. 10 ymisk frímerki eru í røðini*

**Mánadagin 24. februar gav Frímerkjadeildin á Postverki Føroya út tvey nýggj frímerki. Í 2003 fara fleiri broytingar fram viðvíkjandi føroysku frímerkjunum.Tað skal verða stuttligari, lærurikari og harvið meira lokkandi at savna føroysk frímerki**

FRÍMERKI
*Magnus Gunnarsson*

Í nýggja faldaranum "Nýtt úr Føroyum", sum Frímerkjadeildin gevur út fýra ferðir um árið, skrivar deildarleiðarin á Frímerkjadeildini, Knud Wacher, um endurnýggjanina av føroysku frímerkjunum: Í 2003 fara fleiri broytingar fram viðvíkjandi teimum føroysku frímerkjunum. Broytingarnar hava til endamáls at laga frímerkini til nútíðina, og økja um leiklutin hjá frímerkinum sum mentunarboðbera við at teingja frímerkini saman við internetinum. Á Frímerkjadeildini eru tey sannførd um, at nýmótans filateli fer at snúgva seg um at savna vitan um lond, list, náttúru, mentan og mentanarsøgu gjøgnum frímerki, og at luta hesa vitan við onnur gjøgnum internetið, á frímerkjaframsýningum o.s.fr.

### Endamálið við broytingunum

Endamálið við broytingunum er fyrst og fremst at gera dagliga postin meira undirhaldandi og læruríkan við frímerkjum við ymiskum evnum og myndevnum. Hvørt frímerki skal verða ein eggjan til at fara út á internetið, og leita eftir meiri upplýsingum um ta søgu, frímerki avmyndar. Nýggi frímerkjahátturin verður forvitnisligari og meira upplýsandi bæði fyri frímerkjasavnarar og móttakarar av postinum. Ørk við seks, átta ella tíggju frímerkjum, áljóðandi sama virði, verða givin út, og øll frímerkini avmynda eitt ávíst evni.

Har afturat skal tað verða stuttligar og læruríkari og harvið meira lokkandi at savna føroysk frímerki. Vit vilja røkka hesum máli, uttan at tað gerst dýrari at savna føroysk frímerki, sigur Knud Wacher, deildarleiðari á Frímerkjadeildini.

Á nýggju frímerkjunum sum komu út 24. februar, hevur listamaðurin Anker Eli Petersen teknað og designað myndirnar um fornnorrøna gudakvæðið "Vøluspá". Hini frímerkini við myndum frá Vágatunnlinum hevur Kári Holm Olsen designað, og Per á Hædd hevur tikið myndirnar.



*Anker Eli Petersen listamaður hevur teknað og designað nýggja frímerkini »Vøluspá«*



*Kári Holm Olsen á marknaðardeildini hjá Frímerkjadeildini hevur designað frímerkini um Vágatunnulin, og Per á Hædd hevur tikið myndirnar*



*Knud Wacher, leiðari á Frímerkjadeildini*



# Alt er farið fram eftir lógini

**Alt, sum gjørt er í málinum um fiskiloyvið til Jógvan S, er gjørt við heimild í lógini um vinnuligan fiskiskap, sigur Fiskimálaráðið**

FISKILOYVI
*Edvard Joensen*



*Alt, sum farið er fram í málinum um gomlu Ågot - Jógvan S - er gjørt við heimild í lógini um vinnuligan fiskiskap, sigur deildarstórin á Fiskivinnustovuni*

Alt, sum hent er í málinum um gomlu Ågot, sum nú eitur Jógvan S. er í tráð við lógina um vinnuliga fiskiskap, sigur deildarstjórin á Fiskivinnustovuni í Fiskimálaráðnum.

Hóast Jógvan S er næstan eina helvt størri enn bæði Skørin og Barið tilsamans, er ikki talan um nakra øking av veiðitrýstinum, sigur Andras Kristiansen, deildarstjóri á Fiskivinnustovuni. Tað er staðfest í tilsøgnini um fiskiloyvið, sum latin er smápartafelagnum Nakki, í og við, at fiskidagarnir hjá bátunum Skørini og Barinum eru umroknaðir til Jógvan S.

Tilsøgnin um at flyta fiskiloyvini hjá Skørini og Barinum er givin í skrivi frá Fiskimálastýrinum tann 29. apríl 2002. Har verður eisini sagt, at ein treyt, sum fylgir við, er at eigarin av loyvinum, tað vil siga smápartfelagið Nakkur, váttar fyri fiskimálastýrinum - nú Fiskimálaráðið - at Barið og Skørin:....»ikki verða sett inn í vinnuliga fiskiskap aftur«.

Hendan tilsøgnin verður sostatt grundarlag undir, at Skørin ikki kann koma aftur í flotan fyri trolbátin Leitið, sum sagt verður bæði av vinnufóli og politikarum, at ælanir skulu vera um. Sosialurin prentaði í gjár teir spurningar, vit ætlaðu at seta Fiskimálaráðnum um hetta mál, men sum ikki vórðu settir, tí eingin var at hitta í Fiskimálaráðnum, sum kundi svara teimum.

Eftir at blaðið við spurningunum var komið á gøtuna, hava vit so tosað við Fiskimálaráðið, sum váttar, at eingin umsókn er komin um at fáa Skørina inn aftur í fiskiflotan fyri nakað av teimum førunum, sum nevnd eru í blaðnum mikudagin.

Somuleiðis váttar eigarin av Leitinum og Gáshøvda fyri Sosialinum, at slík umsókn fer heldur ikki at koma.

Andras Kristiansen, deildarstjóri á Fiskivinnustovuni, sigur, at tað er ikki rætt at brúka grein fimm í lógini um vinnuligan fiskiskap til at prógva, at fiskifør ikki kunnu skifta millum høvuðsbólkar.

Hann sigur, at tann greinin er sett i lógini, tá øll skip vórðu uppmáld av nýggjum og farið varð at brúka merkingina BT í staðin fyri BrT. Hetta varð tá gjørt, fyri at eingin skuldi koma tvørt fyri av einum møguligum muni, sum kundi standast av nýggju uppmátingini, soleiðis at skip, sum møguliga lógu á markinum til eitt nú 110 tons, kundu detta burtur ímillum.

# Altjóða kvinnubønardagur




**Kvinnur um allan heim halda felags bønardag í morgin. Í Føroyum verður byrjað klokkan 19.30 á trimum ymiskum støðum**

BØNARDAGUR
*Edvard Joensen*

Altjóða kvinnubnardagur verður hildin í morgin. Talan er um tvørkirkjuligt tiltak, sum hildið verður fyrsta fríggjadag í mars á hvørjum ári. Í ár eru tað kvinnur úr Libanon í Miðeystri, sum skipa fyri og hava valt tema.

Í ár er heitið á tiltakinum »Halgi Andi - fyll okkum«, sigur franciskanarsystur Marisa, sum er ein teirra, ið stendur fyri føroyska partinum av tiltakinum.

Hon sigur, at i Føroyum veðrur biðið í trimum ymiskum støðum klokkan hálvum átta í annaðkvøld. Í Mariukirkjuni í Tórshavn, í Soli Deo Gloria í Klaksvík og í Missiónshúsinum í Vági. Í Mariukirkjuni fer Triple Trio’in úr Ebenezer eisini at syngja, sigur Systir Marisa.

Dagurin, sum verður hildin um allan heim, byrjar í sólarrenningini á Tonga í Kyrrahavinum og fylgir so sólini allan vegin, til hon er aftur hjá grannunum hjá Tongaoyggjunum, Samoa, hinumegin datolinjuna.

Næsta ár verður aftur bønardagur fyrsta fríggjadag í mars. Tá verða tað kvinnur úr Panama, sum fara at skipa fyri og seta altjóða heitið. Í Føroyum verður tað tá meinigheitin í Hoyvík, sum fer at standa fyri.

# Ågot aftur í føroyska flotan

**Gamla línuskipið Ågot, sum varð strikað úr føroysku skipaskrásetingini, er nú komin aftur í flotan. Skipið eitur nú Jógvan S og fer at royna við línu undir Føroyum**

FISKIVEIÐA
*Edvard Joensen*

Partafelagið Nakkur í Klaksvík hevur keypt gomlu Ågot, sum hevur skift navn og fingið fiskiloyvini hjá línuskipinum Skørini og útróðrarbátinum Barinum. Skipið eitur nú Jógvan S.

Jógvan S stendur í løtuni á sleipistøð í Klaksíkk, har hann verður gjørdur klárur til fiskiskap undir Føroyum.

Jógvan Lützen, reiðari, sigur, at skipið hevur ikki nokk av fiskidøgum til at klára seg við teimum báðum loyvunum, sum eru fingin. Hvussu gjørt verður, tá dagarnir eru uppi, verður neyðugt at finna út av, sum frálíður, sigur hann.

Jógvan S fær ávísar avmarkingar í mun til Skørina, sum hevði loyvi at royna í klettin, sum tikið verður til. Tað sleppa stóru línuskipni ikki, og í hendan bólkin kemur Jógvan S, vísir reiðarin á.

Sann sigur at hann veit ikki reiðiliga, hvat gjørt verður, men vísir á, at teir hava, sum er, bara umleið helvtina av teimum døgum, teir meta seg hava brúk fyri.

